# Heilt burturvið at vit hava kravt 40% í lønarhækking

**– Tað er heilt burturvið, at Maskinmeistarafelagið hevur kravt 40% í lønarhækking til teir, sum skulu sigla við Brimli. Vit hava kravt ímillum 7,65 og 25,1% og tað er ikki órímiligt, sigur Maskinmeistarafelagið**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

– Tá ið Fíggjarmálastýrið ferð eftir ferð kunngerð, at vit hava kravt 40% í lønarhækking, er tað heilt burturvið.

Tað sigur Føroya Maskinmeistarafelag í eini viðmerking til støðuna nú í tólvta tíma, áðrenn málið um lønina hjá teimum, sum skulu sigla við Brimli, verður lagt fyri tingið.

Maskinmeistarafelagið sigur, at tað hevur frá fyrsta degi lagt dent á, at talan er um samráðingar um eitt nýtt skip hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni.

– Viðvíkjandi maskinútgerð, er Brimil soleiðis útgjørdur, at eftir manningarlógini verða munandi størri útbúgvingar- og førleikakrøv sett til maskinmenninar umborð á honum, enn tað verða sett til maskinmenninar á nøkrum øðrum skipi, sum Vaktar- og Bjargingartænastan hevur, ella nakrantíð hevur havt.

– Eins og í øllum øðrum yrkjum, eigur hetta økta krav í sjálvum sær at føra eina hægri løn við sær.

– Afturat hesum hava vit víst á, at lønarlagið hjá maskinmonnunum, sum sigla við Vaktar- og Bjargingartænastuni, er alt ov lágt afturímóti tí, sum maskinmeistarar fáa í løn øðrum vinnum bæði her heima og uttanlands, sigur Maksinmeistarafelagið.

Felagið sigur, at eftir sáttmálunum, sum nú eru, fáa maskinmenninir eina byrjunarløn løn, sum er úr 18.840 krónum til tann lægstlønta, upp í 20.811 krónur til tann hægst lønta.

– Hetta er, sum sagt, lønin til teir, sum eru við skipum, har krøvini til maskinmenninar eru linari enn til teir, sum skulu sigla við Brimli.

– Tað seinasta uppskotið frá Maskinmeistarafelagnum er, at tann lægstlønti skal fáa 20.268 krónur í løn um mánaðin og at tann hægst lønti skal fáa 26.043 krónur í løn um mánaðin.

Hetta er ein lønarhækking uppá ávikavist umleið 7,6 % til tann lægst lønta og uml 25,1 % fyri tann hægst lønta.

Maskinmeistarafelagið sigur, at hetta kann tykjast eitt sindur ógvusligt.

– Men orsøkin er júst tann, at fyri at kunna røkja maskinrúmið umborð á Brimli, verða krøv sett um munandi hægri útbúgvingar- og førleika enn til hini skipini hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni.

– Til at at lúka treytirnar, sum skulu lúkast fyri at kunna sigla við Brimli, krevst tvey ára longri skúlagongd, umframt 2 mánaðar maskintænasta.

– Verður hetta tikið við í metingina, er als ikki talan um nakað órímiligt krav, sigur Maskinmeistarafelagið.



*Tað, sum vit hava kravt, er rímiligt, tí krøvini til maskinmeistararnir umborð á Brimli eru nógv størri, enn krøvini til meistararnir á Tjaldrinum, sigur Maskinmeistarafelagið*

# Rentustuðulin lækkar

**Andstøðan sleppur neyvan í gjøgnum løgtingið við einum uppskotið um at varðveita rentustuðulin á 48 prosentum. Samgongan tekur ikki undir við málinum**

RENTUSTUÐUL
*Magnus Dam*

Tey, sum hava rentuútreiðslur av sethúsalánum, mugu leggja eitt sindur meira til síðis til rentuútreiðslurnar í ár. Stuðulin lækkaði 1. januar úr 48 niður í 44% av rentuútreiðslunum.

Stendur tað til andstøðuna í løgtinginum skal hendan lækkingin setast úr gildi og stuðulin varðveitast uppi á 48%. Andstøðan legði fyri jól fram eitt uppskot, sum mælir til at at seta úr gildi lækkingina. Orsøkin er, at rentan á sethúsalánum er hækkað nógv seinastu tíðina, og tað er sostatt vorðið dýrari at sita í egnum húsum.

Uppskotið hjá andstøðuni miðaði eftir at steðga tí stigvísu lækkingini av stuðulinum, sum byrjaði 1. januar og heldur fram til 1. januar 2003, tá ið stuðulin er komin niður í 40% av rentuútreiðslunum.

Uppskotið hevur verið til viðgerðar í fíggjarnevndini, og í gjár legði nevndin fram álit í málinum. Og eftir álitinum at døma, verður uppskotið felt, tá ið tingmenn fara at atkvøða við aðru viðgerð. Samgonguumboðini í nevndini taka nevniliga ikki undir við uppskotinum og mæla løginginum til at vraka tað.

### Trýstir prísirnar upp

Umboðini grundgeva ikki fyri sínum sjónarmiðum, men tá ið 1. viðgerð var av uppskotinum, gjørdi Sámal Petur í Grund úr Sjálvstýrisflokkinum greitt, at hann ikki tók undir við uppskotinum, tí tað er eitt nú rentustuðulin, sum hevur elvt til, at sethúsaprísirnir eru so høgir í dag. Stuðulin trýstir prísirnar upp, vildi tingmaðurin millum annað vera við.

Sámal Petur í Grund vísti eisini á, at uppskotið fer at tyngja um útreiðslurnar hjá kommununum, tí tær skulu sambært uppskotinum gjalda 15% av rentustuðlinum í staðin fyri 13% sum í dag. Um tað eru hesi sjónarmiðini, sum hava fingið samgonguumboðini til at mæla frá uppskotinum, er ikki greitt.

Undir 1. viðgerðini gjørdi Óli Breckmann kortini greitt, at hann tekur undir við uppskotinum. Um aðrir samgongutingmenn hava somu støðu, fæst at vita, tá ið uppskotið kemur til aðru viðgerð, men líkt er til, at samgongan eins og í øðrum málum stendur saman um at vraka uppskotið.

Umboðini hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum, sum løgdu uppskotið fram, mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotið. Sambært uppskotsstillarunum fer tað at kosta millum 500 og 1000 krónur meira um mánaðin hjá einari familju at gjalda sethúsaláinini, um rentustuðulin fer niður í 44%, nú rentan samstundis er hækkað nógv. Sethúsaeigarar kunnu sostatt byrja longu nú at leggja nakrar hundrað krónur afturat útreiðslusíðuni hvønn mánað.



*Sethúsaeigarar mugu brynja seg til at gjalda meira í rentuútreiðslum í ár og komandi ár. Rentustuðulin lækkaði 1. januar úr 48 niður í 44%*



# Fáa nýtt tinghús í desember

**Í apríl verður farið undir arbeiðið at byggja um telefonverksbygningin og tinghúsið innan. Ætlanin er, at bygningarnir við árslok saman skulu mynda eitt nýtt føroyskt tinghús**

UMBYGGING
*o n o ann ss n*

Gongst sum ætlað, hava føroyingar eitt nýtt tinghús á Vaglinum í Havn í desember í ár.

Í apríl verður farið undir arbeiðið at inrætta tinghúsið av nýggjum, umbyggja telefonverksbygningin og knýta báðar bygningarnar saman til eitt nýtt tinghús.

Løgtingsskrivstovan hevur í lýsingum í bløðunum heitt á áhugaðir arbeiðstakarar, um senda inn upplýsingar, so Løgtingsskrivstovan saman við Heidi Hjalgrímsdóttir Poulsen, arkitekti, og Karl Jacob Danielsen, byggifrøðingi, kunnu gera av, hvørjir arbeiðstakarar eru egnaðir til at bjóða upp á arbeiðið.



*Ting- og landsstýrismanningin savnað uttan fyri tinghúsið beint eftir fyrsta tingfundin, eftir at tinghúsið var liðugt umvælt uttan. Í desember kann manningin savnast í einum heilt nýggjum tinghúsi, sum verandi tinghús er partur av*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Boðið út í tveimum

Arbeiðið at gera nýggja tinghúsið verður boðið út sum tvær sjálvstøðugar verkætlanir. Onnur fevnir um at umbyggja telefonverksbygningin og knýta hann saman við verandi tinghúsi. Hin fevnir um at innrætta verandi tinghús av nýggjum.

Verkætlanin at byggja um telefonverksbygningin er í trimum pørtum. Fyrst skal telefonhústornið takast niður. Síðani skal sjálvur høvuðsbygningurin leingjast við nýggjum trapputorni. Í triðja lagi skal ein tilbygningur gerast í trimum hæddum í leingjan av høvuðsbygninginum. Og at enda skal ein glasgongd gerast millum nýggja tilbygningin og sjálvt tinghúsið.

Ætlanin er, at farast skal undir hetta arbeiðið fyrst í apríl í ár, og meiningin er, at tað skal vera liðugt fyrst í desember.

Verkætlanin at byggja um verandi tinghús innan er eisini ein stór verkætlan. Tinghúsið skal fullkomiliga gerast av nýggjum innan. Húsið skal hava ein nýggjan tingsal, sum við áhoyraraplássum og pressubásum fyllir alt húsið. Opið skal vera upp í tróðri, men kortini skal ein plattur gerast oman fyri salin til pressuna.

Arbeiðið at byggja um tinghúsið skal eftir ætlan byrja í apríl og vera liðugt fyrst í november.

### 22,4 milliónir

Á fíggjarlógini fyri í ár eru settar 22,4 milliónir av til nýggja tinghúsið. Men hendan kemur at hava við sær sparingar í framtíðini. Tí tá nýggja og stóra tinghúsið er liðugt, er ikki longur neyðugt at leiga gomlu Dimmu í Erling Jalsgøtu 6 til Løgtingsskrivstovuna. Ætlanin er nevniliga, at alt tingarbeiðið skal vera savnað í nýggja løgtingshúsinum.

Meðan umbygt verður fer løgtingið at halda til í Útvarpshøllini, eins og tað gjørdi, tá tinghúsið í fjør varð umvælt uttan.

# Sjóumveldið út á 12 fjórðingar

**Løgtingið samtykti týsdagin, at øll føroysk løggáva skal galda út til 12 fjórðingar úr Føroyum í staðin fyri tríggjar sum nú. Orðaskiftið týsdagin snúði seg bert um sjálvt orðið sjóumveldi**

SJÓUMVELDI
*agnus a*

Tá ið Poul Watson vitjaði í summar helt hann seg aloftast meira enn tríggjar fjórðingar úr landi. Har kundi eingin gera honum nakað, tí har er vanlig føroysk løggáva ikki galdandi. Hann kom kortini inn um viðhvørt, og fyri hetta var hann seinni dømdur í Føroya Rætti, tí hann hevði fingið greið boð um at halda seg meira enn tríggjar fjórðingar úr Føroyum.

Kemur Poul Watson til Føroya eina aðru ferð, so er ikki nóg mikið hjá honum at halda seg tríggjar fjórðingar úr landi. Tá skal hann heilt út á 12 fjórðingar, um hann vil hava frið fyri føroysku løgregluni.

Løgtingið samtykti týsdagin, at vanlig føroysk løggáva skal galda út á 12 fjórðingar. Fyri at brúka orðingina hjá meirilutanum í løgtingum, so er sjóumveldismarkið víðkað úr trimum út á 12 fjórðingar. Avleiðingarnar av at víðka sjálvt markið, fingu kortini ikki nógvar viðmerkingar, tá ið løgtingið viðgjørdi uppskotið við aðru viðgerð týsdagin.

### Stríð um orð

Tingmenn høvdu orðið 24 ferðir undir viðgerðini, og at kalla hvørja ferð snúði orðaskiftið seg um eitt broytingaruppskot frá meirilutanum í uttanlandsnevndini. Meirilutin vildi strika orðið sjóumveldi og brúka orðið sjóøki í staðin. Sambært meirilutanum er orðið sjóumveldi eitt ókent orð í føroyska málinum, meðan orðið, sum altíð hevur verið brúkt í hesum sambandi, er sjóøki. Teir mæltu tí løgtinginum til at broyta orðingina í lógini. Hetta elvdi til rættiliga drúgvt kjak, sum helst ørkymlaði tingmenn, meira enn gott er.

Landsstýrið, sum átti lógaruppskotið, og ávísir tingmenn hildu uppá sítt, meðan aðrir tingmenn hildu uppá sítt. Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg greiddu frá, at munur er á teimum báðum orðunum, og at tað rættara orðið er sjóumveldi. Høgni Hoydal segði, at eitt umveldi er eitt myndugleikaøki – tað vil siga eitt rættarligt hugtak, meðan orðið øki bert er eitt landafrøðiligt hugtak. Og hesi sjónarmiðini vóru eisini tey, sum vunnu frama. 15 atkvøður vóru fyri broytingaruppskotinum um orðið sjóøki, meðan 15 vóru ímóti. Sostatt fall uppskotið.

Hetta ber í sær, at føroyska sjóumveldismarkið nú er 12 fjórðingar, og innanfyri hetta er øll vanlig føroysk løggáva galdandi. Hitt markið, sum føroyingar ofta hoyra umrøtt er fiskimarkið, og tað er framvegis 200 fjórðingar úr landi.

Myndatekstur:
Næstu ferð, Poul Watson kemur til Føroya, noyðist hann at halda seg 12 fjórðingar úr landi, skal hann ikki verða tikin. Sjóumveldið verður nú víðkað frá trimum út á 12 fjórðingar



*Næstu ferð, Poul Watson kemur til Føroya, noyðist hann at halda seg 12 fjórðingar úr landi, skal hann ikki verða tikin. Sjóumveldið verður nú víðkað frá trimum út á 12 fjórðingar*